# STÓRT TIVOLI

## á Jóansøku

Opið er: fríggjadag 20 - 24
leygardag 14 - 01
sunnudag 14 - 01



**Bamsutombola - Poppkorn - Hoppiborg - 21 spæl - Karusell**
**Kandifloss - Fiskidammur - Pylsur - Bóltkast - Skjótibásar**

til frama fyri TB

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:



Í frítíðarskúlanum ganga uml. 65 børn og her starvast 7 fólk.

### Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 1. september 2005 ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er seinrapart.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Angelu Petersen, stovnsleiðara, tlf. 314902 ella 26915815.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, Gundadalur, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juli 2005.



Á stovninum eru 6 stovur, 2 vøggustovur, 3 barngarðsstovur og 1 skúlastova. Tilsamans ganga 94 børn á stovninum og her starvast 29 fólk.

### Dagstovnin Lítlaskóg eftir:

- einum pedagogi, fyri pedagog í barsilsfarloyvi, at arbeiða 30 tímar um vikuna á vøggustovu við 12 børnum at byrja 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu. Starvstíðin er 1 ár.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Frígerð Sundsskarð, stovnsleiðara tlf. 319131 ella 219132.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum Lítlaskógi, boks 217, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. juli 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

---

**Tiltøk hjá Synergi í august og september 2005!**

## NÚ KANST TÚ GLEÐA TEG AT KOMA AFTUR ÚR SUMMARFRÍ...



### Fakfestival fyri Frítíðarskúlar 2005

- og øðrum sum arbeiða við børnum 6-9 ár

**11. august**

Nógv spennandi á skránni!

Hvør hevur ábyrgdina av barnauppalingini? Skulu vit blanda okkum, tá børn skeldast? Skulu børnini sleppa at siga "fuck" og "idiot" við hvønnannan? Hvat er ein góður dagur hjá einum barni frá 6-9 ár?

*Málbólkur:* Starvsfólk á Frítíðarskúlum og onnur sum arbeiða við børnum 6-9 ár.



### Spælipláss á dagstovnum

- hvat er eitt gott eitt?

**30. august**

Spæliplássið er ofta størsta rúmið á einum dagstovni, men hvørji eru tey pedagogisku málini og hugsaninar, ið eru knýtt at spæliplássinum? Hvørjar upplivingar og royndir skal spæliplássið geva børnunum?

Hvat kunnu vit gera úti, tá tað "evig og altíð" regnar, er vindur, kalt osfr.? Tað er tann góði spurningurin, sum tú kanst fáa íblástur til á degnum!

*Málbólkur:* Starvsfólk á dagstovnum, foreldur, landslagsarkitektar, urtagarðsfólk og onnur við áhugað fyri økinum, td. byggifyritøkur, politikarar vm.



### Skúlagarðurin, - bert til stuttleika?

**1. september**

Hví er tað týdningarmikið at skapa lokkandi útiumhvørvi á skúlum og hvussu gera vit hetta?

Hvat sigur granskingin um børn, skúla og útiøki?
Hvørjar royndir hava grannalondini?

Kom og fá íblástur og vitan um, hvussu tú skapar lokkandi útiumhvørvi á skúlum. Serfrøðingurin og kultursociologurin, Benny Schytte, fer saman við Michael Jacobæus, landslagsarkitekti og Jenny Lydersen frá Mentamálaráðnum at seta dám á dagin.

*Málbólkur:* Leiðslur á skúlum, skúlastýrislimir, húsavørðar, lærarar, landslagssarkitektar, politikarar og onnur ið vara av skúlanum, serliga við atliti til skúlagarðin og planlegging av útiumhvørvinum á skúlum.



### Messuskúli

**16. september**

At luttaka á eini messu við einum bási er bæði kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi. Við rætta bási og rætta framferðarhátti á básinum, kann tað tó geva fyritøkuni nógv og góð kundasambond. Men:

· Hvat er ein "rættur" básur?

· Hvat er eitt MUST og hvat er absolutt bannlýst?

Bjørn Malmström, fyrrverandi stjóri á "Svenska Messan" í Gøteborg, kemur til Føroya at undirvísa og hann veit hvat hann tosar um!

*Málbólkur:* Fyritøkur sum javnan hava bás á messum, fólk á marknaðardeildum sum samskipa messurnar hjá fyritøkuni og starvsfólk á lýsingastovum.

## ...MEN TRYGGJA TÆR PLÁSS LONGU NÚ!

TEAM85

Synergi

Tilmelding og meira um tiltøkini á www.synergi.fo
tel 22 RING (22 74 64) · fax 322 355 · synergi@synergi.fo